almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# MÁLSVIÐGERI til Veitingardeildina

Hevur tú hug at royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning? So er hetta møguliga nakað fyri teg. Eitt fulltíðarstarv og eitt avloysarastarv sum málsviðgeri á Veitingardeildini á Almannastovuni er leyst at seta til 1. november 2007, ella skjótast gjørligt.

**Arbeiðs- og ábyrdarøki**

- Pensiónsmál – útrokning, áseting og ávísing
- Dagpeningamál – viðgerð, avgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Forskotsrindan av barnapeningi, viðgerð, avgerð, áseting og ávísing
- Uppihaldspeningur – viðgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Gera upp fíggjarliga partin, tá mál ganga út
- Krøv til arbeiðsgevarar
- Aðrar uppgávur

**Útbúgving**

- Skrivstovuútbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving
- Starvsfólkið skal luttaka á útbúgvingartiltøkum hjá Almannastovuni

**Arbeiðsroyndir / førleikakrøv**

- Arbeiðsroyndir innan almenna umsiting ella líknandi starvsroyndir er ein fyrimunur
- Er fleksibul og hevur góð samarbeiðsevnir
- Evni og vilja til at arbeiða saman við øðrum toymum og miðstøðum
- Evni at hava yvirlit við at arbeiða við fleiri uppgávum í senn
- Hava góð evni at umstilla seg tá broytingar henda
- Góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- Hollan kunnleika til KT

**Um deildina**

Á deildini starvast 9 málsviðgerar, 2 fulltrúar og 1 deildarleiðari. Av tí at talan er um eitt arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning, má tann ið sett/-ur verður tola broytingar í starvsinnihaldinum.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og lønt í lønarbólki 3.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Tummas Djurhuus, deildarleiðari á tel 35 35 10, ella á fartelefon 21 54 76.

**Umsókn**

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til Almannastovuna Smyrilsvegur 20, Postsmoga 3096, 110 Tórshavn.

í seinasta lagi Týsdagin 25. september 2007. Vinarliga merkið brævbjálvan: "Veitingardeildin".

KREA.FO



# HEYSTSTEVNAN 2007

5. TIL 7. OKTOBER

„EG VILDI AT ALT FÓLK HARRANS VAR PROFETAR"



**PROFETISK RÁÐSTEVNA**

Filadelfia í Havn skipar í ár fyri heyststevnu við Larry Randolph sum gestatalara. Larry er viðagitin fyri sína sterku profetisku tænastu. Stevnan verður í døgunum 5.-7. oktober. Les meira um stevnuna og hvussu tú meldar teg til á www.filadelfia.fo

FILADELFIA · LANDAVEGUR 22 · 100 TÓRSHAVN · TEL 314828 · WWW.FILADELFIA.FO



Klæmint Weihe

# MÓTTØKA

Klæmint Weihe fer úr stjórastarvinum á SEV tann 1. oktober, og í hesum sambandi bjóðar Elfelagið til almenna móttøku.

## Fríggjadagin 28. september 2007 kl. 15-18.

Høvuðsskrivstovan, Landavegi 92, FO-100 Tórshavn

Vinarlig heilsan
Leivur Hansen
stýrisformaður

SEV